– trygt og ómakaleyst til hús



INNI

# Stásilig arkitektteknað hús við panoramaútsýni

**Tú fært ikki betri útsýni yvir Havnina og Nólsoyarfjørð enn úr hugnaligu og liviligu húsunum, ið standa í gangifrástøðu til miðbýin.**









## Fyrsta fatanin

Húsini standa í náttúruvøkrum og barnavinaligum umhvørvi við blindan veg og eru løtt at koma til. Tú hevur bø og haga beint við hondina, men samstundis tekur tað bert eina løtu at ganga oman í býin, og tú fært bilin heilt til hurðina. Uttanfyri er alt grivið upp, drenað og steinsett av nýggjum omanfyri húsini.

## Ljós og luft – stílur og snið

Húsini, ið eru arkitektteknaði, eru væl innrættað og livilig. Stílurin er ljósur og strammur undirstrikaður av frálíka ljósinum frá takvindeygunum í erva og stóru vindeygunum í stovuni, sum geva eitt frálíkt ljós inn í húsini. Tú hevur panoramaútsýni yvir Havnina og út yvir allan Nólsoyarfjørð, so vindeyguni verða so at siga samband millum inni og úti. Tú kennir teg ongantíð innibyrgdan, men verður heldur inspireraður og lættur í huga. Stóra og góða útigólvið móti suður- og vesturskyninum gevur møguliga fyri at njóta hvørja góðveðursløtu.

## Niðasta hædd

Niðasta hædd er innrættað og mest sum øll gjørd av nýggjum, og hon er løtt at gera til sjálvstøðuga íbúð, um tað ynskist. Alt er snotiligt og væl gjørt úr góðum tilfari.

## Innan

Í erva er hjallur, inngongd, durur, gongd, baðirúm, 2 kømur, køkur / alrúm og útsýnisstova, bryggers við egnari inngongd, millumgongd, baðirúm og hjúnarúm við útgongd til terassu. Í neðra er inngongd, vaskirúm / fýrrúm, kamar / skrivstova, sjónvarpsstova, millumgongd, baðirúm og 2 kømur.

## Fakta

**Adressa** .........Skotarók 6, Tórshavn
**Byggiár** ..........1992 / 2005
**Hæddir**...........2
**Gólvvídd**.........uml. 200 $m^2$
**Grundøki**........512 $m^2$
**Prísuppskot** ....kr. 2.800.000,00









PF inni
Niels Finsensgøta 37

Postboks 364
FO-110 Tórshavn

Telefon 35 42 00
inni@inni.fo

Sí fleiri hús á **inni.fo**